tíðindablaðið **sosialurin**
**Internet: www.sosialurin.fo**

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Stórt misálit á samgonguna

## *Oddagrein*

Veljarakanningin hjá Sjónvarpinum og Sosialinum gevur sitandi samgongu eitt stórt misálit. Landsstýrið missir meirilutan í Løgtinginum, og harafturat fær høvuðsmálið hjá samgongunu - fullveldisætlanin - ikki sannførandi undirtøku frá føroysku veljarunum.

Tað er minni enn eitt prosent á muni millum tey, sum velja fullveldi, og tey, sum siga nei til fullveldi. Hetta er ikki sannførandi grundarlag hjá landsstýrinum at samráðast um eina nýggja stjórnarskipan. Nú er talan um eina veljarakanning, men hon eigur at geva landsstýrinum eina ábending um, hvat føroyski veljarin heldur.

Eitt er, at meirilutin er so tepur sum 0,7 prosent. Eitt annað er, at tað eru bara 45 prosent, sum í løtuni taka undir við fullveldisætlanini hjá landsstýrinum. Tað merkir, at minni enn helvtin av føroysku veljarunum sigur ja til eina so víðgongda stjórnmálabroyting. Henda støðan eigur at geva landsstýrinum nakað at hugsa um.

Í hesi veljarakanningini kundu tey, sum vórðu spurd, bara svara, um tey søgdu ja ella nei til fulveldi. Nú hevði sjálvandi verið áhugavert at fingið at vita, hvørja askoðan veljarar høvdu til tey ítøkiligu uppskotini hjá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum.

Báðir teir stóru andstøðuflokkarnir ganga nógv fram í veljarakanningini, og Javnaðarflokkurin hevði aftur verið størstur flokkur við 27,3 prosentum av atkvøðunum og 9 tinglimum. Tað eru óivað fleiri orsøkir til hesa gongd, men høvuðsorsøkin er helst hon, at nógvir veljarar - eisini í øðrum flokkum - taka undir við sjálvstýriskósini hjá Javnaðarflokkinum. Hon er hóvlig og meiri realistisk enn fullveldisætlanin hjá landsstýrinum.

Tað er óivað her, at orsøkin til skortfleingjuna, sum Fólkaflokkurin fær, skal finnast. Bara helvtin av fólkafloksveljarunum taka undir við fullveldi og Fólkaflokkurin gongur nógv aftur - eini 5 prosent og hevði mist tríggjar tinglimir, um val var nú.

So er spurningurin, um teir hóvligu tinglimirnir hjá Fólkaflokkinum, fáa høvdið fyri seg og fáa talað restina til rættis, so ein loysn verður funnin í spurninginum um framtíðarstøðu Føroya á eini leið, sum bæði Javnaðarflokkurin, Fólkaflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og helst eisini Tjóðveldisflokkurin kunnu taka undir við. Tað krevur, at Tjóðveldisflokkurin má slaka nakað, men ein slík loysn hevði í øllum førum havt eina nógv breiðari undirtøku í fólkinum. Vit høvdu eisini sloppið undan eini støðu, sum klívur føroysku tjóðina í tveir líka stórar partar, við óhepnum politiskum avleiðingum í drúgva tíð afturat.

***Sosialurin***



*Ýlandi og blinkandi politibilurin var á veg norður gjøgnum Nólsoyar Páls Gøtu, har hann yvirhálaði fleiri bilar, sum koyrdu inn til síðuna, tá ein bilur koyrdi út fyri hann*

**Mynd: Símun á Høvdanum**

# Politibilurin rendi á tríggjar bilar

*Politibilur úr Klaksvík, sum í skundi var á veg til vanlukkuna á Viðareiði hósdagin, rendi á tríggjar bilar og er vrak*

EYÐUN KLAKSTEIN

Ein av politibilunum í Klaksvík var úti fyri einum ógvusligum óhappi hósdagin.

Politiið varð boðsent til vanlukkuna á Viðareiði, har ein smágenta var dottin í eina á, men á vegnum gjøgnum Klaksvík, var politibilurin úti fyri einum óhappi, sum hevði við sær, at bilurin helst er vrak.

Ýlandi og blinkandi politibilurin var á veg norður gjøgnum Nólsoyar Páls Gøtu, har hann yvirhálaði fleiri bilar, sum koyrdu inn til síðuna.

– Tá eg kom norður móti ferjuleguna, tók eg nakað av ferðini av, tí ein bilur var frammanfyri. Men tá hann tóktist at fara inn til høgru síðu fyri at halda av, trýsti eg aftur á spitaran og skuldi fara fram við honum. Men tá legði hann tvørtur um vegin og beint út fyri okkum, greiðir førarin, Karl Johansen, frá.

### Fýra bilar

Politibilurin rendi beint inn í bilin, sum ætlaði sær tvørtur um vegin, og bilurin við bláa blinkinum á takinum varð síðani slongdur oman á parkeringsplássið á ferjuleguni, har hann rendi inn í tveir parkeraðar bilar.

Tríggir av teimum fýra bilunum eru illa farnir, og ivasamt er, um politibilurin og tann fyrst árendi bilurin verða gjørdir aftur. Fjórði bilurin fekk lítlan skaða, og eingin fólkaskaði stóðst av óhappinum.

– Vit ringdu eftir óhappið beinanvegin á politistøðina, haðani ein politistur kom við einum nýggjum bili, so vit kundu sleppa til Viðareiðis, sigur Karl Johansen.

# Verður asfalterað millum Vág og Lopra

EIRIKUR LINDENSKOV

Tá munnligir fyrispurningar vóru fyri í tinginum í síðstu viku, setti Henrik Old, løgtingsmaður, Finnboga Arge, landsstýrimanni fyrispurning um vegin millum Vág og Lopra

Henrik Old segði, at vegur ongantíð er gjørdu rættuliga liðugur, og at nú var illa koyrandi eftir vegnum. Hann segði, at arbeiðð við at spreingja við Núpin eisini hevði elvt til, at vegurin ongantíð varð gjørdur liðugur, m. a. vantar ovasta lagið av asfaltinum.

Men loysn er nú í ljósmála. Finnbogi Arge svaraði, at hetta vegastrekkið verður tað fyrsta, sum Landsverkfrøðingurin fer undir, tá teir aftur fara at asfaltera fyrst í meimánaði.



# Smágenta á Viðareiði doyði

*2 ára gomul genta á Viðareiði doyði, eftir hon datt í eina á og varð tikin við av vatninum*

EYÐUN KLAKSTEIN

Ein vanlukka á Viðareiði hósdagin hevði við sær, at ein smágenta doyði.

2 ára gamla gentan og 3 ára gamli beiggi hennara vóru farin út um húsini, sum standa uppi við Garð á Viðareiði. Onkursvegna datt gentan í ánna, sum rennur nærindis húsini, og hon varð tikin við av streyminum. Nógv vatn var í ánni hósdagin.

Beiggin, sum sá systur sína detta í ánna, fór eftir mammu síni, men hóast mamman leitaði fram við ánni, sá hon ongantíð dóttrina. Mamman rópti á fólk um hjálp, men tá tey fingu eyga á gentuna, fleyt hon á sjónum út fyri Døtlisgjógv.

Gentan var farin við ánni allan vegin út á sjógv, og har áin rennur út av er eitt fall upp á einar 20 metrar. Fólk sluppu í fyrstu atløgu ikki til gentuna, tí tað er torført at sleppa niður í gjónna og ringt var í sjónum.

Ringt varð eftir hjálp úr Klaksvík, haðani sløkkiliðið, løgreglan og sjúkrabilur fóru avstað. Tá hjálpin kom fram, høvdu menn júst fingið fatur á gentuni.

Teir vóru farnir niður við línu. Tað er ein lítil fjøra, har tað bar til at koma niður á, og tað eydnaðist teimum at fáa fatur á gentuni. Men tá var einki at gera, tí hon var deyð.



Fá arbeiðsroyndir til at søkja inn á reklamuskúla ella grafiskan designskúla




Kundi tú hugsað tær at slept tínum sonsum leysum og farið á grafiskan designskúla ella reklamuskúla, so bjóðar reklamuhúsið Sansir tær arbeiðsroyndir, áðrenn tú søkir.
Reklamuskúlin setur krav um, at tú hevur 2 - 3 ára arbeiðsroyndir ella útbúgving frá Den Grafiske Højskole ella líknandi. Den Grafiske Højskole og Danmarks Designskole krevja ikki arbeiðsroyndir, men mæla til, at tú fært tær royndir, áðrenn tú søkir.
Vilt tú hava upplæring hjá Sonsum, er tað ein fyrimunur, um tú hevur studentsprógv, HF, HH ella líknandi alment búgvandi royndir.
Góður form- og litsansur og eitt gott hugflog er avgjørt eitt krav. Ert tú ein góður fríhondsteknari, er tað enn betri. Og hevur tú tað gott við tónleiki, ger tað ikki støðuna verri.
Eitt lætt lyndi, góð samstarvsevni og royndir at arbeiða í bólki eru eisini góð at hava í viðførinum.
Send eina stutta øðrvísi frágreiðing um teg sjálva/n saman við tekningum og/ella øðrum grafiskum tilfari, tú hevur tilevnað.
Kunnu vit ikki taka dagar ímillum innsenda tilfarið, fara vit at geva tykkum eina grafiska uppgávu at loysa, sum vit síðani taka støðu útfrá.

Tú skalt byrja 7. august 2000. Seinasta freist at søkja er mánadagin 1. mai 2000.

SANSIR

Sansir pf, Tinghúsvegur 47, Box 1099, FO-110 Tórshavn, Tel 355 355, Fax 355 350, sansir@sansir.fo

**www.sansir.fo**